


**Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:**

**www.sosialurin.fo**

# Neyðars Tjaldur

*H71 fekk uppreisn eftir stórtapið fyri StÍF, men mótstøðan frá Tjaldrinum var syndarliga lítil*



*Serliga eftir at Jákup á Borg kom inn, kom gongd á kontraspælið hjá hoyvíkingum*

JÁKUP MØRK

H71-Tjaldur 40-21

Í fjør stríddust júst hesi bæði liðini um at sleppa undan botnsessinum i bestu deildini, og eftir fyrstu dystirnar á árinum, vóru helst mong, sum roknaðu við, at leikluturin fór at gerast hin sami í ár.

Tað kann eisini væl vera, at talan er um tvey av veikaru liðunum í deildini, men tað var rættiliga skjótt, at hoyvíkingar vístu, at teir í hvussu so er eru betri enn runavíkingarnir. Ein hampuliga trygg leiðsla var skjótt fingin í lag, og eftir hetta var bert ein vegur.

Tjaldursmenn svaraðu eitt sindur aftur um miðjan hálvleikin, men so var eisini liðugt. Hoyvíkingar fingu betri tak á í verjupartinum, og meginpartin av tí, sum slapp framvið, tók endurrisni Egin Høgnesen sær av. Hinvegin lá nú væl fyri hjá hoyvíkingunum, og serliga eftir at kviki Jákup á Borg var komin á vøllin, vóru fleiri kvik mótálop fingin í lag.

Eisini Johnny Djurhuus og Tróndur Vatnhamar royndust væl, tá teir komu á vøllin, og millum annað hevði hin seinni nevndi dagsins detalju, tá hann sera hegnisliga fekk fatur á einum langbólti og hegnisliga skrúvaði hann framvið málverjanum.

Móti endanum av dystinum tóktist einasti spurningurin at vera, hvørt tað skuldi eydnast hoyvíkingunum at fáa positivan málmun. Hetta eydnaðist akkurát ikki, tí meðan tapið seinast var við 20 málum, vóru tey bert 19 í yvirskotið hesuferð.

### Okkurt kann henda

Hóast bakgrundin sum nevnt var heldur bílig, so skerst ikki burtur, at hoyvíkingar hóast alt eru betri, enn úrslitið á Skála vísti.

Liðið er kanska styrkt nakað við nýggja rumenska leikaranum, og við honum og Halgir sum bakspælarum, er tað so ikki skotstyrkin, sum væntar.

Nógv talar tó enn fyri, at vit eins og fjør fáa eina tvíbýtta kapping, har skott verður millum tey niðaru og ovaru liðini. Hinvegin er hetta skottið kanska ikki heilt so vatntætt í ár, sum í fjør, tí niðaru liðini tykjast øll at vera styrkt.

Bæði kollfirðingar og hoyvíkingar tykjast verið betri fyri í ár enn í fjør, og fær Tjaldur so eisini ætlaða styrkin úr Jugoslavia, røkist kanska fyri, at vit fáa onkur meira ella minni óvæntað úrslit. Tað hevði í øllum førum verið sunt fyri kappingina, um so varð, tí í fjør spældu ovaru og niðaru liðini at kalla í hvør sínari deild.

### Neyðugt við styrki

Tá hetta er sagt, skal eisini viðmerkjast, at tað so avgjørt er neyðugt hjá tjaldursmonnum at fáa styrk, um nakað sum helst skal koma burtur úr kappingarári teirra.

Sverri Justinussen er ein fram úr góður leikari, men ein leikari megnar altso ikki at bera eitt lið. Tað sást ferð eftir ferð í fjør, at úrslitini hjá Tjaldrinum fylgdu avrikunum hjá Sverra, og tað kann ikki vera rætt, at ein maður skal hava somikið stóran týdning fyri liðið.

### Dysturin í tølum

Eingin dómaraseðil móttikin við evstamark

**Støðan, 1. deild menn**

| | | d | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | StÍF | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 81 | 42 | 39 | 4 |
| 2 | VÍF | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 62 | 52 | 10 | 4 |
| 3 | Kyndil | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 65 | 57 | 8 | 2 |
| 4 | Neistin | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 30 | 22 | 8 | 2 |
| 5 | H71 | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 59 | 60 | -1 | 2 |
| 6 | KÍF | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 43 | 58 | -15 | 0 |
| 7 | Tjaldur | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 67 | 116 | -49 | 0 |

# 3rd Tórshavn International



*Russin, Alexander Grischuk, hevur higartil vunnið seks sigrar á rað, og í talvheiminum verður hetta mett sum eitt satt bragd*

6. umfar í 3rd Tórshavn International varð telvað mikudagin 11/10 og Alexander Grischuk úr Russlandi hevur nú vunnið 6 sigrar á rað! Í 6. umfari basti hann stórmeistaranum Baburini IRL, sum einki talv hevði tapt higartil. Hinir mótstøðumennirnir sum hann hevur niðurlagt, eru eisini allir í heimsklassa. Hetta fer at líkjast einum bragdi, sum sjáldan sæst á hægsta støði.

Venjarin hjá honum, Bykhovsky, luttók eisini í kappingini trý tey fyrstu umførini. Hann mátti tá venda nøsini heimeftir aftur til Russlands, eftir at hava fingið staðfest krabbamein. Henda syrgiliga hending sær út til at hava givið unga Grischuk eitt sovorðið árræði, at eingin klárar at standa mát við hann. Russarin er nú púra einsamallur á odda við 6 stigum.

Argasti mótstøðumaður hansara, Ponomariov UKR, vann eisini sera sannførandi móti næsthægst rataða telvaranum í kappingini, Vadim Milov SUI. Sostatt er Ponomariov framvegis nøkunlunda við í stríðnum um tær 40.000 krónurnar, sum er fyrsta virðisløn. Hann hevur nú 4,5 stig.

### Soltið hjá føroyingunum

Føroyingarnir høvdu soltna úrtøku í 6. umfari móti útlensku telarvarunum. John Arni Nilssen tapti móti skotska stórmeistaranum Jonathan Rowson, meðan Ólavur Simonsen tapti móti svianum og fide meistaranum Johan Eriksson.

Hinir føroyingarnir telvdu allir móti hvør øðrum og frægasta úrslitið var tað hjá Martini Poulsen, sum megnaði at telva javnt móti føroyameistaranum Flóvin Tór Næs.

Støðan í toppinum hjá føroyingunum er nú:

Herluf Hansen HT
2,5 stig
Flóvin Tór Næs HT
2,5 stig
John Arni Nilssen SF
2,5 stig
Martin Poulsen HT
2,5 stig
Torbjørn Thomsen KT
2,5 stig
John Rødgaard VT
2,5 stig

### Væl vitjað heimasíða

Sum kunnugt, so hevur talvsambandi latið upp nýggja heimasíðu í sambandi við kappingina.

Síðan ella slóðin eitur www.faroechess.com, og ikki kann sigast annað enn, at hon hevur verið væl vitjað.

Frá tí at síðan lat upp, fram til gjáramorgunin høvdu gott 8.000 vitjandi verið á síðuni.

Á síðuni ber millum annað til at fylgja við, tá ymsu talvini verða telvað, og einki er at ivast í, at hetta eisini hevur áhuga í londunum uttan um okkum.



# Henning roynir seg í OB

*Í hesi vikuni luttaka tveir føroyskir landsliðsspælarar í venjingini hjá fremsta felagnum í Odense*

Hóast fótbóltsárið heima á landi er liðugt, so stríðist ein av spælarunum, sum hevur spælt í landskappingini og steypakappingini heima á landi, fyri at fáa pláss í donskum fótbólti.

Talan er um Henning Jarnskor úr GÍ. Henning var longu undan kappingarenda í Føroyum í Danmark. Tað lá í luftini, at hann fór at royna seg í 1. deildarfelagnum B 1913, og tað er framvegis ikki óvist, at tað verður í tí felagnum, at Henning fer at spæla fótbólt.

Men Henning vil fegin royna, hvussu langt fótbóltsevnini hjá honum røkka. Tí hevur hann biðið um loyvi at venja við superliguliðnum hjá OB, og tað hevur hann fingið loyvi til í hesi vikuni.

Mánakvøldið var Henning á talentliðnum hjá OB, sum spældi á útivølli í Keypmannahavn ímóti B93. Tað oysregnaði, og tískil vóru umstøðurnar ikki tær bestu. Henning Jarnskor var vinstri bakkur í 4–4–2 spæliskipan, og B93 vann 2–1.

Týsdag og hósdag venja teir bestu í OB tvær ferðir, og hinar dagarnar venja teir eina ferð.

– Tá Henning hevur vant við okkum alla vikuna, fara vit at hva høvi til at staðfesta, hvørjum støði hann er á, og hvørjum liði vit kunnu brúka hann á, sigur OB venjarin Troels Bech.

– Venjingin hevur kanska verið eitt sindur strevnari, enn hon plagar at vera í Føroyum. Vit hava havt sera nógvar tekniskar venjingar, sigur Henning Jarnskor, sum eftir vikuskiftið roknar við at frætta um sínar framtíðar møguleikar í OB.

Í hesi vikuni hava teir verið gott og væl tjúgu til venjing í OB. Fleiri av ungu spælarunum hava verið á danska U–21 landsliðnum, sum týskvøldið spældi 2–2 á heimavøllinum í Odense ímóti Bulgaria. Málverjin, Jesper Christiansen, luttók heldur ikki í venjingini fyrrapartin av vikuni. Hann hevur verið í Manchester United og royndarvant.

*Í løtuni roynir Henning Jarnskor seg í OB, har liðfelagin á landsliðnum, Johan Byrial Hansen, telist millum føstu leikararnar*



### Nýggi landsliðsmaðurin

Henning Jarnskor hevur í Odense vant saman við einum liðfelaga. Talan er um Johan B. Hansen, sum er eitt av feskastu nøvnunum í OB. Hóast hann er nýggjur í felagnum, so hevur tað eftir summarfrítíðina eydnast Johan B. Hansen at stríða seg til fast pláss á besta liðnum.

Johan var leygardagin fyri fyrstu ferð á føroyska landsliðnum. Fleiri av teimum, sum sóu dystin, hava sagt, at Johan B. Hansen var mest eyðsýndi útispælarin á føroyska liðnum ímóti Sveis.

Umframt Johan B. Hansen hevur bara ein annar føroyskur spælari í ár roynt seg í landsdysti fyri fyrstu ferð. Tað er Sunnvard Joensen, sum nú býr í Danmark. Hann spældi 2. hálvleik ímóti Finnlandi niðri í Spania. Sunnvard var tann 69. landsliðsmaðurin, og leygardagin var Johan B. Hansen tann 70. føroyski landsliðsspælarin. Landsliðið hevur higartil spælt 69 altjóða skrásettar landsdystir

JH

# Nonbo til Viborg

*AGF miðvallarin fer eftir ársskiftið at spæla við Viborg*

JÁKUP MØRK

At fíggjarliga støðan í AGF ikki er hin besta, er skiftið hjá Michael Nonbo eitt gott dømi um.

AGF tóktist nevnliga ikki at vera áhugað í at leingja sáttmálan við 26 ára gamla miðvallarstríðsmannin, og tí hevur hann ístaðin gjørt sáttmála við Viborg. Sáttmálin verður galdandi frá ársskiftinum, tá sáttmálin hjá Nonbo við AGF rennur út.

Michael Nonbo er annars ein spælari við drúgvum royndum í donskum toppfótbólti. Yrkisleið hansara byrjaði í Næstvæd, har hann spældi 1987 dystir. Í 1996 skrivaði hann undir sáttmála við AGF, og fram til dagin í dag hevur hann spælt 130 dystir við besta liðnum hjá felagnum.

# David í Grimsby

*Misnøgdi álopsleikarin sleppur nú at royna seg í enskum fótbólti*

Ein av feløgunum og kappingarneytunum hjá Toda Jónsson í FCK álopinum hevur nú gjørt sáttmála við annað felag.

David Nielsen hevur, síðani Roy Hodgson kom til FCK, havt sera ilt við at gera seg galdandi. Hann hevur onkra hendinga ferðina, tá fleiri av hinum álopsmonnunum hava verið skaddir ella leikbannaðir, verið við frá fyrsta bríksli. Annars hevur hann onkra ferðina verið á beinkinum, og fleiri ferðir hevur hann als ikki verið í 1. liðs hópinum.

Nú hava David Nielsen og FCK funnið eina loysn, sum hevur við sær, at David Nielsen fær nýggjar avbjóðingar at fáa fótbóltsspælið aftur á kósina.

Í fyrradagin boðaði FCK frá, at ein leiguavtala er gjørd við eingilska felagið Grimsby Town FC. Liðið er í næstbestu deildini. Sáttmálin er galdandi frá nú av og fram til síðst í januar. David Nielsen hevur vant saman við nýggju liðfeløgunum síðani mikudagin. Tað er møguleiki fyri, at hann verður á Grimsby liðnum í morgin. Tá skulu teir spæla landskappingardyst ímóti Huddersfield. Grimsby stríðist fyri at sleppa burturúr niðurflytingarhóttanini. Teir hava í níggju dystum bara skorað fýra mál.

JH

# SSF nýggjan landsliðsvenjara

*Svimjisamband Føroya hevur frá 1. september 2000 fingið nýggjan landsliðsvenjara.*

Tað er tann 29 ára gamli Jesper Ottosen, ið er hálvur føroyingur.

Jesper hevur sum barn og ungur luttikið í nógvum svimjikappingum, og síðani hann var 15 ára gamal hevur hann eisini verið venjari.

Sum venjari hevur hann tikið øll tey skeiðini, ið takast kunnu í Danmark, so ikki kann sigast annað enn, at SSF hevur fingið ein venjara við góðari útbúgving.

Jesper er útbúgvin fysioterapeut, og í fjør arbeiddi hann á sjúkrahúsinum á Tvøroyri. Samstundis var hann eisini venjari hjá Tvøroyrar Svimjifelag.

Men eftir sparingar innan sjúkrahúsverkið flutti Jesper aftur til Danmarkar, har hann nú arbeiðir.

Venjarastarvið hjá Svimjisambandinum skal hann røkja við síðuna av, men svimjisambandið ætlar, at hann skal fáa góða hjálp frá venjarunum hjá teimum føroysku svimjifeløgunum.

### NJM og OYL

Spurdur um hvørji tiltøk standa á skránni hjá føroyska svimjilandsliðnum sigur Jesper, at í december verður Norðurlanda Junior Meistarakappingin hildin í Noreg, og komandi summar verða so Oyggjaleikirnir á Isle of Man.

Hetta verða tvey stór og spennandi tiltøk komandi veturin, og verður hetta samstundis tey tiltøkini, ið størst orka verður løgd í frá landsliðsvenjarans síðu.



*Nýggi landsliðsvenjarin fer í fyrstu atløgu at leggja størsta dentin á komandi Oyggjaleikirnar og Junior NM-kappingina*
**Mynd: SJ**